# Grønland sleppur ikki upp í UEFA

**Men føroyingar og hini limalondini, sum ikki eru í ST, sleppa at halda fram í europeiska fótbóltsfelagsskapinum**

FÓTBÓLTSPOLITIKKUR
*Jóannes Hansen*

Grønlendingar eru ikki sjálvstøðugir limir í europeiska fótbóltssamgonguni. Og í gjár gjørdist greitt, at um Grønland skal gerast limur í UEFA, so skal Grønland fyrst gera upp við støðuna, sum teir hava í danska ríkinum.

Europeiska fótbóltssamgongan, UEFA, hevði eykaaðalfund í Prag í gjár. Á fundinum var millum annað viðgjørt, hvørji krøvini skulu vera til teirra, sum í framtíðini fara at søkja um limaskap í UEFA.

Limalondini samtyktu uppskotið frá aðalnevndini. Uppskotið gekk út uppá, at í framtíðini skal tað vera soleiðis, at tað bara kann koma upp á tal at innlima nýggj limalond, um tey eru limir í ST.

Tað eru ikki so nógvar europeiskar fótbóltstjóðir, sum ikki eru limir í UEFA. Men nýggja ásetingin kemur illa við hjá grønlendingum. Grønland hevur arbeitt við møguleikanum at vinna limaskap í europeisku fótbóltssamgonguni, men nú verður ikki møguleiki fyri hesum, uttan at Grønland fyrst fær limaskap í Sameindu Tjóðunum.

Limaskapurin er sjálvandi eisini treytaður av, at talan er um eitt nationalt fótbóltssamband, og at tað er skipaður fótbóltur í landinum.

### Serstøða

Tá málið varð umrøtt og samtykt fyrrapartin í gjár, varð staðfest, at nýggja samtyktin skal ikki hava avleiðingar fyri fótbóltstjóðirnar í UEFA, sum ikki eru limir í ST. Í tí sambandi vórðu nevndar Føroyar og fótbóltstjóðirnar í Stórabretlandi. Tær eru Skotland, Ongland, Wales og Norðurírland.

Torleif Sigurðsson, formaður í FSF, og Ísak Mikladal, aðalskrivari í FSF, vóru á eykaaðalfundinum, sum tey 51 UEFA limalondini høvdu í gjár.

– Nýggja samtyktin kom ikki óvæntað á okkum. Málið varð viðgjørt, tá vit fyrr í summar vóru á norðurlendskum fundi í Lofoten. Brøðratjóðirnar tóku undir við UEFA uppskotinum, og tað gjørdu vit eisini, siga føroysku umboðini úr Prag.




*Torleif Sigurðsson, formaður í FSF, og Ísak Mikladal, aðalskrivari í FSF, vóru á eykaaðalfundinum, sum tey 51 UEFA limalondini høvdu í gjár.*

# Oddaliðini vinna hvørja ferð

**Eingin føroyingur var á vøllinum, og líkindini vóru út av lagi vánalig, tá eitt umfar í superliguni mikukvøldið var á skránni**

SUPERLIGAN
*Jóannes Hansen*

Skulu fótbóltslíkindini í Danmark mikukvøldið sammetast við okkurt, sum ikki er so langt burtur frá fótbóltshugaðum føroyingum, so kann tað vera steypafinalan á ólavsøku og landsdysturin á heimavølli ímóti Luksemborg.

Tað oysregnaði, og tað var nógvur vindur kring alt Danmark, tá 11. umfarið var á skránni í superliguni. Harvið eru ein triðingur av dystunum í hesum kappingarárinum spældir.

### Sami toppur

Brøndby og AaB hava verið mest sannførandi fyrstu tíggju umførini, og bæði oddaliðini vunnu mikukvøldið. Brøndby hevði vitjan av illa stadda Vejle, sum einki fekk til hús við sær. Men teir í Vejle vóru óhepnir. Í 1. hálvleiki gjørdi Vejle málverjin sjálvmál, og eitt korter undan leikloki økti Brøndby, eftir stórt kiks í Vejle verjuni. Í síðsta minuttinum minkaði Vejle upp á brotsspark um munin til 2–1.

Í Aalborg vóru líkindini sum allar aðra staðni. AaB vann 2–1 ímóti Lyngby, sum ikki veit, hvussu tað verður við framtíðini í bestu deildini, og sum veit, at teir um eitt ár fara at missa nógv avhildna venjaran, Poul Hansen. AaB skoraði sigursmálið, tá tað restaðu fimm minuttir.

### Eingir føroyingar

Esbjerg er framvegis á triðja plássi. Christian Høgni Jacobsen var ikki á liðnum, sum vann 4–3 í Silkeborg. Bo Nielsen, sum Silkeborg akkurát hevur keypt úr AGF, skoraði øll málini hjá heimaliðnum, og Jess Thorup skoraði trý mál fyri Esbjerg. Fjórða málið hjá Esbjerg skoraði álopsmakkarin hjá trímálsskjúttanum – Henrik Nielsen.

Í Parkini oysregnaði eisini. Todi Jónsson er ikki heilt klárur at spæla enn, og hóast Heine Fernandez heldur ikki var við, so hevði FCK ongar trupulleikar ímóti heilt illa stadda AGF. Úrslitið var 3–0, og miðvallarin Thomas Røll, sum aftur hesa ferð var í álopinum, skoraði tvey mál. Morten Bisgaard skoraði til 2–0. Hetta var fyrsta málið, sum hann hevur skorað, síðani hann í summar kom til FCK.

OB – uttan Johan Byrial Hansen – megnaði 2–2 í Viborg, og AB megnaði eisini 2–2. Teir spældu í Ikast ímóti FCM, sum er samansetta liðið hjá Ikast og Herning. Fyrrverandi Herning spælarin, Abdul Sule, skoraði bæði málini hjá AB.

# Óli skoraði enn eina ferð

**Øssur Hansen sat uttanfyri við skaða frá landsliðsferðini í Slovenia, tá B93 fekk trý stig á heimavølli**

1. DEILD DANMARK
*Jóannes Hansen*

Mikukvøldið vóru øll feløgini í næstbestu donsku deildini í eldinum. Og hesa ferð vunnu bæði feløgini hjá føroysku landsliðsspælarunum.

Óli Johannesen, komandi B68 venjarin, Frank Skytte, og Hvidovre høvdu vitjan av Fredericia. Fyrstu løtuna bendi alt á stórsigur til heimaliðið, men tá dómarin hevði brikslað fyri síðstu ferð, vóru teir í Hvidovre fegnir um, at tað hevði eydnast teimum at vinna 4–3.

Tá 26 minuttir vóru farnir, var Hvidovre frammanfyri 4–0. Longu í 5. minutti skoraði Óli Johannesen fyrsta málið.

Teir bara 316 áskoðararnir vóru í góðum hýri fyrstu tríggjar fjórðingarnar av tíðini, og tað høvdu teir alla orsøk at vera. Men so bitu teir negl síðstu løtuna. Fredericia minkaði um munin í 72. minutti, og átta minuttir seinni var støðan 4–3. Í sambandi við síðsta málið, sum varð skorað upp á brotsspark, misti Hvidovre málverjan, og síðstu tíggju minuttirnar var talan um stórt stríð, sum Hvidovre megnaði at koma burturúr.

### Øssur skaddur

Tá landsliðið var í Slovenia, tóktist Øssur Hansen ikki at vera so væl upplagdur, sum hann ofta hevur verið á landsliðnum. Øssur varð skiftur út, og Súni Olsen kom á vøllin.

Orsøkin var fyrst og fremst, at Øssur undir upphitingini til landsdystin fekk ein løst í ryggin. Pínan var nógv, og síðani hann kom aftur til Danmarkar, hevur Øssur ikki verið førur fyri at venja saman við liðfeløgunum í B93.

Tí var hann ikki á liðnum mikukvøldið. Tað vóru bara 155 áskoðarar á Østerbro stadion, og teir sóu B93 vinna 1–0 ímóti FC Århus. Málið skoraði Thomas Høy, tá seinna umfarið var tíggju minuttir gamalt.

Herfølge hevði vitjan av Randers Freja, sum varð sent aftur til Jyllands við 2–0 tapi.




Hugnið um heimið við ljósketum


Bamboo
130,-


Gummihjørtur
149,-


Ríspapír lampa
199,-


Silva t/vegg
391,-

Einar Mikkelsen Sp/F
Góðk. el-innleggjari
Bøgøta 12
Postboks 321 · FO-110 Tórshavn
Telf. 31 22 11 - Fax 31 07 45

Carlsberg Cup

Bowling kapping
tann 27/10-2001
Kostnaður 100,-

Vinnarin fær vikuskiftisferð fyri 2 v/hotel í Danmark

Tilmelding á tlf: 312121
Tilmeldingarfreist 20/10-2001
16 ára aldursmark

Bowling Høllin á Hálsi
Stuðla hava

Atlantic Airways
Coca-Cola
Carlsberg

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

Arbeiðsmaður

Til vegadeildina hjá Tórshavnar kommunu verður søkt eftir arbeiðsmanni við stóra koyrikortinum.

Áhugaði verða biðin um at venda sær til Snarskivuna.

SNARSKIVAN

Suðuroyar Ellis- og Røktarheim
800 Tvøroyri

Sjúkrasystir
Sjúkrahjálparar/
heilsuatstøðingar

1 fast starv sum sjúkrasystir við fullari arbeiðstíð í skiftandi vaktum er leyst til setan frá 1. november 2001.

2 størv sum sjúkrahjálparar/heilsuatstøðingar við eini arbeiðstíð uppá 0,7 í skiftandi vaktum eru leys til setan frá 1. november 2001.

Eisini verður søkt eftir avloysara fyri sjúkrahjálpara/heilsuatstøðing við fullari arbeiðstíð í tíðarskeiðnum frá 1. november 2001 til 30. september 2002.

Nærri upplýsingar viðvíkjandi størvunum fáast við at venda sær til fyristøðukvinnuna Sunnevu Petersen, tlf. 371666 lok. 147.

Umsóknir við avriti av prógvum v.m. verða at senda til **Suðuroyar Ellis- & Røktarheim, Boks 51, 800 Tvøroyri**

innan 27. oktober 2001.

ÓTRÚLIGT TILBOÐ!
AEG VASKIMASKINA

BÍLIGARI ENN ÚTSØLA!
SUPER LÁGORKA
8790,00
Spar 1660,-
ALTÍÐ BÍLIGAST Í ELDING! AVGJØRT FØROYA LÆGSTI PRÍSUR!
AEG
VASKIMASKINA (SUPER LÁGORKA)
ØKO LAVAMAT JUBILINE 15.50
• 30 cm stórt lúkuop • Fuzzy Logic • A/A/B • 4-trins vatninngang við pletforrit • Sentrifuguskjótleiki: 1550,1200,900,700,400 og skolisteðg • 0,94 kWh/45 ltr. • Vanl. prísur: 10450,00

ELDING
SMS - Tel 319697 • Saltangará - Tel 449697 • Klaksvík - Tel 479697

Aðalfundur

Ársaðalfundurin verður í ÍSF-húsinum 11. november 2001.

Skrá sambært lógini.

Judosamband Føroya

Internet Sosialur in
www.sosialurin.fo

Uppsetan og skipan av barrum
Til:
Brúdleyp
Rundar føðingardagar
Starvsfólkaveitslur
Ársveitslur
Reseptiónir
og tílíkt

Hans á Lag Sp/f
Tlf. 21 93 83
hanslag@post.olivant.fo

Sosialurin 311820